VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, um kvøldið hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, sum frálíður vátaslettingur og hitin millum 5 og 8 stig, um kvøldið niður í 3 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av norði, seinni av ymsum ættum. Um kvøldið stívt andøvsgul av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 0 og 3 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul av eystri og møguliga kavi. Hitin um frostmarkið.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum frostmarkið og ÷4 stig.

Nýggjur hundraðkrónuseðil til føroyingar

Klaksvík og høvuðsvinna Føroya, fiskivinnan, eru myndevnini á tí nýggja føroyska hundraðkrónuseðlinum, sum kom út í gjár

PENGAR
Theodor E. D. Olsen

Torben Nielsen, stjóri í Danska Tjóðbankanum avdúkaði tann nýggja hundraðkrónuseðilin í gjár
Mynd: Jens Kr. Vang

Tá danir skifta pengaseðlar út, skulu føroyingar eisini gera tað. Sambært lógini um pengaseðlar í Føroyum skulu føroyskir seðlar nevniliga hava sama virði og somu stødd sum teir donsku. 3. juli 2001 varð so ein nýggjur 50-krónuseðil sendur út á marknaðin, og í gjár átti tann nýggi 100-krónuseðilin tørn at sleppa niður í teir føroysku lummarnar og yvir um handilsdiskarnar.

Myndevnið framman á seðlinum er úrskurður av einum toski. Aftran fyri toskin er vatnlitamynd við evnum úr sjónum. Á baksíðuni sæst inn yvir Klaksvík, sum er ein tann týdningarmesti fiskivinnubýurin í landinum. Hetta er ein eftirgerð av eini vatnlitamynd, ið Zacharias Heinesen hevur gjørt. Hann hevur eisini myndprýtt 50-krónuseðilin.

Tryggari

Tann nýggi 100-krónuseðilin er sambært danska Tjóðbankanum tryggari enn 50-krónuseðilin. Hann hevur nevniliga eina sonevnda heilmynd ella hologram, ið saman við øðrum trygdum, sum t.d. rútatráði við litskifti og vatnmerki, skulu tryggja. at føroysku pengaseðlarnar ikki verða eftirgjørdir.

Fyrstu ferð føroyskir pengaseðlar vórðu prentaðir, var fyri fimti árum síðani í danska tjóðbankanum.

Tá sum nú varð hetta gjørt sambært lóg frá 1949 um pengaseðlar í Føroyum, har tað verður álagt Tjóðbankanum at framleiða serligar føroyskar seðlar við føroyskum teksti. Á seðlunum eru tvinnar undirskriftir. Aðra eigur fíggjarmálaráðharran, og hina eigur ríkisumboðskvinnan.

Afturvendandi myndevni

Ikki fyrr enn nú er eitt og sama evnið avmyndað á øllum seðlunum, nevniliga føroysk djór. Í tveimum teimum undanfarnu útgávunum hevur forsíðan verið prýdd við súmbolum úr Føroya søgu, føroyskum vinnulívi og myndum av søguligum persónum. Á baksíðunum hava ofta landslagsmyndar verið avmyndaðar, sum hava havt eitt ávíst tilknýti til forsíðuna.

Í 1951 varð tann fyrsti føroyski seðilin – 5-krónuseðilin – útgivin, og síðani eru fleiri seðlar sendir á marknaðin.

Í gjár mátti so faðir skriftmálsins, V. U. Hammershaimb, lata heiðursplássið á hundraðkrónuseðlinum til ein tosk, sum skal avmynda okkara útflutningsvinnu á tí nýggja seðlinum, ið er dustgulur og 135x72 millimetrar til støddar.

Í næstum verða faldarar sendir í hvørt hús í Føroyum, sum skulu kunna fólk um nýggju seðlarnar. Tað er nevniliga meðan seðlarnir eru nýggir og enn ókendir, at vandin fyri følskum seðlum er størstur.

Enn ber tó til at brúka teir gomlu seðlarnar, men teir verða tiknir inn, so hvørt peningastovnarnir fáa teir inn um diskin. Hinir seðlarnir í røðini, 200-, 500-, og 1000 krónuseðlarnir koma væntandi, áðrenn tvey ár eru liðin.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷7
Nuuk	÷3
Qaqortoq	0
Ammassalik	÷6
Saint John's	÷7
Halifax	÷10
Reykjavík	1
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	4
Lerwick	6
Aberdeen	7
London	9
Tromsø	÷2
Bergen	6
Oslo	–
Stokkhólm	3
Keypmannah.	5
Helsinki	1
Moskva	1
Berlin	6
Warzawa	4
Kiev	2
Bukarest	÷2
Paris	4
Madrid	4
Róm	–
Malorca	14
Athen	12
Malta	13
Tunis	14
Beijing	1
New Dehli	8
Bangkok	29
Jakarta	32
Sydney	–
New York	÷2
Miami	15
Los Angeles	16
Meksikobýur	13
Panama	32
La Paz	11
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	33

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt djúpt lágtrýst, 965 hPa í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing eystan og hevur nógvan vind við sær á okkara leiðum.

Lágtrýstið við Føroyar fer spakuliga í landnyrðing og hevur kalda luft av norði við sær.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 15/01 kl. 06⁰⁰– 16/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,1°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

AVFALLIÐ



Avfallið: 9,4 mm – mált frá 15/01 kl. 06⁰⁰–16/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 75,4 mm

VESTFALLSKYRRINDI

10. jan.: Fyrra kvarter
11. jan.: Mánin longst frá jørðini
18. jan.: Fullmáni
23. jan.: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
17. jan	05.40	18.04	04.40	17.04	04.55	17.19	07.40	20.04	08.40	21.04	03.55	16.19	02.55	15.19	05.55	18.19	06.55	19.19	05.25	17.49	06.40	19.04
18. jan	06.29	18.53	05.29	17.53	05.44	18.08	08.29	20.53	09.29	21.53	04.44	17.08	03.44	16.08	06.44	19.08	07.44	20.08	06.14	18.38	07.29	19.53
19. jan	07.17	19.42	06.17	18.42	06.32	18.57	09.17	21.42	10.17	22.42	05.32	17.57	04.32	16.57	07.32	19.57	08.32	20.57	07.02	19.27	08.17	20.42
20. jan	08.07	20.30	07.07	19.30	07.22	19.45	10.07	22.30	11.07	23.30	06.22	18.45	05.22	17.45	08.22	20.45	09.22	21.45	07.52	20.15	09.07	21.30

5 707265 100050 >